# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hetta er seinasta royndin. Taka irakar sær ikki um reiggj, fara okkara hermenn til hús*
*(amerikanskur senatorur)*

**STUTT SAGT**

## Sóknast eftir arvingi

Tann, sum dugir at greiða sína ættartalvu aftur til árið 1066, eigur kanska at kanna hana, tí tað er ikki óhugsandi, at viðkomandi er trúnarvingi. Í hvussu er er ein enskur felagsskapur farin at leita eftir einum eftirkomara hjá enska konginum Harold Goodwinson, sum fall í tí víðagitna bardaganum við Hastings. Vilhelm Landtakari, sum vann bardagan, setti seg á ensku trúnuna, og sonur Harold, Aetheling, viðurkendi tann nýggja kongin. Nú leitar felagsskapurin English Heritage eftir onkrum eftirkomara hjá Harold Goodwinsson, sum sambært felagsskapinum kann krevja ensku trúnuna. Kravið er tó rættiliga veruleikafjart, tí tann enska trúnan hvarv í 1603, tá Ongland og Skotland gingu saman, og trúnan bleiv bretsk.

## Stór inflasjón

Í síðsta mánað hækkaðu prísirnir heili 36,3 prosent í afrikanska landinum Zimbabwe, og harvið kom inflasjónin í fjør upp á 1281 prosent, sigur BBC. Inflasjónin er ein ovurstórur trupulleiki í Zimbabwe. Samstundis eru læknar og sjúkrasystrar farin í verkfall við kravi um hægri løn, og tað bøtir ikki um støðuna hjá tí almenna heilsuverkinum. Fleiri serfrøðingar geva stjórnini skyldina, men Robert Mugabe, forseti, sigur, at fíggindar innan- og uttanlands hava skyldina av vánaligu støðuni.

## Mannfall

Seinastu nátt vóru bardagar millum NATO-hermenn og Taliban-hermenn í Afganistan, og sambært keldum hjá verjusamgonguni fullu umleið 150 Taliban-hermenn í bardøgunum. Myndugleikarnir í Kabul siga tó, at tað rætta talið er 80. Teir seinastu dagarnar hava NATO-hermenninir hert álopini á Taliban nærhendis pakistanska markinum. Eitt nú hava flogfør bumbað fleiri støð, har hildið verður, at hermenn hjá Taliban halda til.

# Bush viðgongur mistøk men fær ikki stuðul

**George W. Bush átekur sær ábyrgdina av mistøkum í Irak, men hansara floksfelagar taka ikki undir við avgerðini at senda fleiri hermenn til Irak.**



*George W. Bush heldur sjónvarpsrøðu fyri amerikanska fólkinum*

Í røðu síni fyri amerikanska fólkinum segði forsetin, at hann er sinnaður at senda 20.000 hermenn afturat til Irak fyri at steðga tí átrúnaðarliga stríðnum, og at hann er eisini til reiðar at játta meiri pengar til at byggja Irak uppaftur.

– Ein ósigur í Irak hevði verið ein vanlukka, segði Bush.

Men hann hevur ilt við at sannføra sínar egnu floksfelagar, at avgerðin at senda fleiri hermenn til Irak er tann rætti vegurin at ganga.

– Eg kann ikki taka undir við, at vit skulu senda fleiri hermenn hagar, segði republikanski senatorurin Norm Coleman í morgun. Hann verður roknaður sum ein av teimum týdningarmestu republikonsku kongresslimunum. Ein annar, Sam Brownhawk, ið verður roknaður sum møguligt forsetaevni hjá republikanarunum, segði tað sama. Undan røðuni hjá forsetanum høvdu sjey senatorar hjá republikanarunum boðað frá, at teir taka ikki undir við at senda fleiri amerikanskar hermenn til Irak.

**Seinasta royndin**

Republikanski leiðarin í Senatinum, Mitch McComel, styðjar ætlanina hjá forsetanum, men leggur afturat, at hetta er seinasta royndin at tryggja frið í Bagdad.

– Forsetin hevur gjørt irakska forsætisráðharranum greitt, at ger irakska stjórnin ikki sína skyldu, fara vit til hús, sigur McComel.

Demokratarnir, sum hava meiriluta í Kongressini, hava frammanundan boðað frá, at teir styðja ikki ætlanina hjá forsetanum, og tí er greitt, at Kongressin fer at venda sær ímóti ætlanini. Tað fær tó neyvan nakrar avleiðingar, tí forsetin eigur tað avgerandi orðið í uttanríkispolitiskum viðurskiftum.

Men tað politiska grundarlagið undir avgerðum hansara í sambandi við Irak er veikt, skrivar AP.

# Ísrael er ein veruleiki

**Hamas-leiðarin Khaled Meshaal ásannar, at Ísrael er veruleiki, og at eitt ríki eitur Ísrael**

Fyri fyrstu ferð sigur ein av leiðarunum í Hamas, at rørslan ásannar tann veruleika, at tað er eitt sjálvstøðugt ríki, sum eitur Ísrael.

Khaled Mashaal er tann fremsti politiski leiðarin í Hamas, sjálvt um hann býr í Damaskus í Sýrialandi. Í samrøðu við Reuters sigur hann, at tann stóri trupulleikin í Miðeystri er ikki, at ísraelsmenn hava sítt egna ríki, men at palestinar einki ríki hava.

Hamas hevur altíð sýtt fyri at viðurkenna ísraelska ríkið. Tað ger rørslan framvegis, men hetta kann broytast, sigur Khaled Mashaal.

– Men fyritreytin er, at palestinar fáa sítt egna sjálvstøðuga ríki, og vit fara ikki at viðurkenna Ísrael sum ríki fyrr enn tá, sigur Khaled Mashaal. Reuters skrivar, at fleiri leiðandi limir í Hamas hava sagt okkurt, sum líkist hesum, men at hetta er fyrstu ferð, at ein av leiðarunum í rørsluni nemur við tankan um at viðurkenna Ísrael.

Khaled Mashaal er ættaður úr Ramallah á Vestara Áarbakka, men hann vaks upp í Kuwait. Sjálvur sigur hann, at ísraelska fregnartænastan Mossad royndi at beina fyri sær, tá hann búði í Jordan fyri tíggju árum síðani.



*Rashid Mashaal: – Ísrael er ein veruleiki*